# Jørgen má for Guds skyld lata Atla sita heima

*Formaðurin í Felagnum Nótaskipum fer fullkomiliga at oyðileggja okkum framtíðina í svartkjaftavinnuni, sigur Jákup Olsen, sum eisini er limur í Felagnum Nótaskipum*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú er at kalla opið kríggj í felagnum Nótaskipum um, tann fiskivinnupolitikk, vit skulu føra í svartkjaftavinnuni.

Og ein av limunum í felagnum, Jákup Olsen, í Vági, sigur bart út, at næstu ferð, vit fara at samráðast um svartkjaft, er eitt tað týdningarmesta, at formaðurin í felagnum, Atli Hansen úr Gøtu, ikki sleppur við, men verður sitandi heima.

Annars hevur formaðurin verður fastur fusur undir liðini á landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, tá ið vit hava samráðst um svartkjaft, men hetta má for Guds skyld ikki henda, tá ið vit aftur fara at samráðast við norðmenn, íslendingar og ES aftur, sigur Jákup Olsen.

Hann sigur, at Atli Hansen er nevniliga ikki áhugaður í at fáa føroyingum so høga svartkjaftakvotu sum gjørligt.

– Tað einasta, sum Atli Hansen er úti eftir, er at knúsa fiskimálaráðharran politiskt, tí eg dugi ikki at síggja nøkur onnur motiv, enn politisk motiv, til at formaðurin í Nótaskipum førir seg soleiðis fram.

– At hann so samstundis skal taka ein tann mest týðandi vinnumøguleikan, vit hava eftir, við í fallinum, ger minni, sigur Jákup Olsen.

– Tað einasta, sum tað tykist, at hann er úti eftir, er vit vit skulu fáa eina lítla svartkjaftakvotu, so at okkara fiskimálaráðharri skal tapa slagið um svartkjaftin, tí tað verður eitt álvarsligt politiskt bakkast fyri hann.

Tað, sum hann sipar til, er m.a tær ákoyringar, sum fiskimálaráðharrin hevur fingið frá Atli Hansen seinastu tíðina um svartkjaftakvotur og loyvir.



*–Hvussu kann Atli Hansen, formaður í Felagnum Nótaskipum standa øksl við øksl við Jørgen Niclasen í høðrum samráðingum uttanlands, t á ið hann fer soleiðis við honum herheima, spyr Jákup Olsen, limur í Felagnum Nótaskipum*

– Atli Hansen hevur bæði skuldsett Jørgen Niclasen fyri at siga ósatt og fyri annað mangt.

– Hvussu skulu teir báðir so kunna standa øksl ímóti øksl í hørðum samráðingum uttanlands, tá ið tónalagið ímillum teir her heima er so vánaligt, spyr Jákup Olsen.

**Nøgdur við lítið**

Jákup Olsen sigur, at tað, sum, sum Atli Hansen hevur spælt út við, vísir, at hann letur sær lynda, at føroyska svartkjaftakvotan verður ikki meiri enn eini 160.000-180.000 tons, tí krevur hann av Jørgen Niclasen, at vit ikki útbyggja vinnuna meir.

– Hetta er fullkomiliga burturvið. Tvørturímóti er tað alneyðugt, at vit hava nógv, góð skip at fiska svartkjaft við, so at vit við fullum rætti kunnu krevja eina nógv hægri kvotu.

–Tað kunnu vit ikki á nakran hátt, so leingi, vit ikki hava skip til at fiska við.

Jákup Olsen sigur, at at svartkjafturin er ein av okkara heilt fáu møguleikum, sum vit hava eftir, til at fáa meiri burturúr fiskivinnuni, og tann møguleikan mugu vit undir ongum umstøðum lata okkum gleppa av hondum.

– Skulu vit hava sjálvstýrið og menna ein sjálvstøðugan búskap, er júst hetta vegurin at ganga. Men tað vilAtli Hansen jú heldur ikki, Leggur Jákup Olsen afturat.

# Bilstevna í Klaksvík



Stór bilstevna verður í Klaksvíkar Ítróttarhøll 8. og 9. apríl. Øll tey kendastu merkini verða at síggja

Aftur í ár verður stór bilstevna í Klaksvíkar Ítróttarhøll. Sum vant verður høllin full av nýggjum bilum, og sjálvandi verða øll tey kendastu merkini umboða. Í ár verða tað Reyni Service, Norðbil, Esmar Simonsen, Ivan Johannesen og Opel sum koma at vísa sínar bilar fram. Tað er tíbetur blivin ein afturvendandi táttur, at Klaksvíkar Ítróttarhøll hvørt ár, er rammin um stórar bilstevnu. Norðoyingar er sum heild takksamir yvir, at bilsølurnar geva sær tíð til at plaga kundarnir í útjarðarøkinum, og er tað altíð ein fyrimunir, at sleppa undan at fara heilt til Havnar at hyggja eftir nýggjum bilum. Fyrireikarnir siga í tíðindaskrivið at stevnan verður leygardagin 8. og sunnudagin 9. apríl, og er hon opin báðar dagarnir frá kl. 16.00 til 21.00.

Fyri at tey vaksnu kunnu í friði hyggja eftir teimun nýggjum bilinum, verður skipa fyri undirhaldið fyri børnini viðsíðuna av høllini – inni í Lognbrá. Har verður barnafilmar vístir ímeðan stevnan er opin.

## Viðmerking:

# Søgulig skjøl

Av misgávum varð myndin av Steinbjørn B. Jacobsen sett í skeiva grein í blaðnum í gjár. Vit biðja høvundan umbera okkum mistakið

*blaðst.*

Jú vit liva í søguligum døgum. Tað er ikki á hvørjum degi, at ein væl mannað og væl fyrireikað nevnd fer til Danmarkar at samráðast fyri at fáa okkum skipað viðurskifti við Danmark. Tað skulu tey øll takkast hjartaliga fyri. Tey gjørdu sær ikki fyri skommum. Eisini ein tøkk til Jenis av Rana fyri hansara beinrakna viðmerking. Øll hava fylgt við í loftmiðlunum, sum á nøktandi hátt hava greitt frá gongdini.

Í morgun var eg spentur at síggja tey bæði stóru bløðini. Hvussu mundu tey fara at viðgera málið. Ofta verður tosað um, hvussu heft ella óheft tey eru.

Tíðindablaðið Sosialurin, (hevur orðið Tíðindablaðið altíð verið skrivað við so lítlum bókstavum?) sum »Hin føroyski Javnaðarflokkurin« eigur, hevði »Fingu kvotu at selja« og »Avgerðinar fella« (um ítrótt, týsdag hava teir nógv um ítrótt) sum stórtíðindi á forsíðuni.

Oddagreinin var skrivað av formanninum í flokkinum ella fyri hansara rokning. Samrøða við formanninum við heitinum: »Fullveldisuppskotið skrædnaði«. Ein ungur blaðmaður hevði tvær síður við eini naknari frásøgn um málið og tríggjar stórar myndir, harav tann eina var við sum ífylla. Eitt skjótt »lisið« blað.

Hvussu so við gomlu Dimmu, sum nú verður marknaðarførd undir heitinum Nýggja Dimma og hevur sum undirheiti, Óheft og Álítandi? Jú, eisini teir nevna kvotumálið )teir hava sjálvir reist málið og rósverdigt greitt frá tí í fleiri bløðum) og viðgera flogbóltsdystin eins og Sosialurin ger, men høvuðsyvirskriftin er: Kalla etniska útrokning skammleysa og órímiliga. Skrivað av teimum báðum sera dugnaligu blaðmonnunum Una Arge og Inga Rasmussen. Inni í blaðnum hava teir heilar 7 sera lesuverdar longri og stytri greinar. Harav tann eina er ein fródlig søguliga samanbering við Ísland. Eisini oddagreinin er sera væl skrivað. Sum rosinan í pylsuendanum kemur so Aktuella Hornið, sum báði er aktuelt og skemtuligt.

Tvey sera ymisk bløð, týsdagin 21.3.00, men samstundis tvey sigandi søgulig skjøl.

**21.3.2000**
**Steinbjørn B. Jacobsen**



2 ´arin

Leygardagur 25. mars 2000

## Heldur internetið

Fleiri og fleiri føroyingar brúka heldur internetið enn telefonbókina, tá teir skulu leita eftir telefonnumrum




# Rokari av rang



Mynd: Jens Kr. Vang

Fjúrtan ára gamli Tommy Andreasen í Nólsoy hevur annað í knokkinum enn skúla og lestur. Hann mjólkar, egnir, arbeiðir upp á motorar og finglast við elektronikk. Og drongurin hevur áhugaverdar og beinraknar meiningar um lívsins viðurskifti